ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

FKF jour nr 09-122_1

Løgtingið

Mál: 09/00368-74
Viðgjørt:

Løgtingsmál nr. xxx/2010: Uppskot til løgtingslóg um bygging av íbúðum í Sandavági til sinnisveik

Uppskot

til

løgtingslóg um bygging av íbúðum í Sandavági til sinnisveik

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at fara undir at byggja íbúðir í Sandavági til sinnisveik. Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 16,2 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2013.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 354045 • E-mail: ahr@ahr.fo

1. Almennar viðmerkingar
Endamálið við lógini er at geva landsstýriskvinnuni í almannamálum heimild til at fara undir at byggja íbúðir í Sandavági til sinnisveik.

Løgtingslóg nr. 23 frá 14. mai 2008 um bygging av sambýli í Tórshavn til sinnisveik fer úr gildi við árslok 2010, og hevur landsstýriskvinnan í hesum sambandi tikið avgerð um, at flyta verkætlanina úr Tórshavn til Sandavágs.

Málið um sambýli í Tórshavn til sinnisveik stavar heilt aftur frá aldarskiftinum, og fleiri ætlanir hava verið á borðinum, sum av ymiskum orsøkum ikki hava vunnið frama.

Galdandi verklagslóg leggur upp til, at bygdar verða 16 íbúðir í tveimum byggistigum í Tórshavn, har fyrra byggistig fevnir um 10 íbúðir, og seinna byggistig fevnir um 6 íbúðir. Í stødd eru íbúðirnar 45 fermetrar til støddar, har talan er um sovirúm, stovu, køk, baðirúm og gongd. Harafturat verða felagshølir, hvørs endamál er at vera karmurin um alt felagslív í sambýlinum. Umframt verður talan um starvsfólkahølir. Verklagslógin leggur upp til, at íbúðirnar eru ætlaðar teimum, sum í dag búgva á psykiatriska deplinum.

Málið hevur verið umrøtt á landsstýrisfundi í februar í ár, har landsstýriskvinnan fekk undirtøku fyri at broyta ætlanina frá íbúðum til eitt siðbundið sambýli, men eftir nærri umhugsni hevur landsstýriskvinnan gjørt av, at fara aftur til uppruna ætlanina frá 2007, sum fevnir um at byggja íbúðir, og at ætlanin verður broytt frá bert at fevna um íbúgvarnar á psykiatriska deplinum, til sinnisveik í síni heild.

Tað hevur víst seg at ganga striltið við at fáa byggiloyvi til endamálið í Tórshavn. Hetta m.a. orsakað av, at Tórshavnar kommuna hevur sett ymisk krøv í sambandi við innkoyringina til stykkið, har ætlanin er at byggja. Hesi krøv fara at seinka byggingini munandi.

Landsstýriskvinnan hevur tí valt at fara undir einamannagongd, har bygt verður í deplum eins og í Suðuroynni. Í Suðuroynni verða tað í løtuni bygdar 10 íbúðir og eitt virknistilboð, sum í felag hava til endamáls at samskipa alla sosialpsykiatri í Suðuroynni.

Tað er tí natúrligt, at valið fellur á Vágoynna, har tað frammanundan eru tvey sambýlir. Við at byggja í Vágoynni, verður farið undir sama leist sum í Suðuroynni, og samstundis verður møguleiki fyri at samskipa øll tilboðini.

Grundhugsanin við deplinum í Vágum er
- at talan verður um eitt tilboð, har sambýlið á Traðarvegi og Fobbakletti verða bústaðartilboð til teir veikaru bólkarnar, sum hava størri hjáveru fyri neyðini
- at sambýlini so vítt møguligt verða útslúsingarstøðir
- at búfólkini á sambýlunum so vítt møguligt verða fyrireika/vand til at flyta í sjálvstøðuga íbúð har tað ber til.

Almannamálaráðið hevur havt fund við Vága kommunu um ætlanina, og er hon sinnað at lata grundstykkið til endamálið uttan kostnað.

Av tí at talan er um broytingar í mun til uppruna ætlanini frá 2007, er neyðugt at gera nýggja løgtingslóg, soleiðis at hon samsvarar við ta ætlan, sum avgerð verður tikin um at føra út í verki. Tí verður nýggj verklagslóg løgd fyri Tingið, sum heimilar landsstýriskvinnuni at fara undir at byggja íbúðir til sinnisveik í Sandavági.

2. Avleiðingar av uppskotinum

Fíggjarligar avleiðingar
Galdandi verklagslóg heimilar landsstýriskvinnuni at fara undir fyrra byggistig av tveimum til 10 íbúðir, og er kostnaðurin mettur til 16,2 mió. kr. Innanfyri hendan fíggjarkarm verður mett, at byggjast kunnu millum 10 og 16 íbúðir í einum byggistigi í Sandavági.

Íroknað kostnaðin er ráðgeving og innbúgv. Útreiðslan verður borin av landskassanum burturav.

Ilt er at meta um rakstrarkostnaðin, men av tí at talan er um ein lættari bólk enn tey, sum búgva á sambýli kann roknast við eini árligari rakstrar útreiðslu á millum 2 og 3 mió. kr.

Tíðarætlan
Bygt verður yvir tvey fíggjarár. Í 2011 verða settar av 8,1 mió. kr. og 2012 verða settar av 8,1 mió. kr. ella 16,2 mió. kr. í alt.

Ummæli
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Umsitingarligar avleiðingar
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar.

Umhvørvisligar avleiðingar
Uppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar.

Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

Sosialar avleiðingar
Bøtt verður um bústaðarumstøðurnar hjá sinnisveikum í Føroyum

	Fyri landið/lands-myndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Ja	

3. Serligar viðmerkingar

Til § 1:
Í lógargreinini verður heimilað landsstýrismanninum at fara undir at byggja íbúðir í Sandavági til sinnisveik.

Til § 2:
Gildiskomuregla.

Almannamálaráðið, 15. november 2010

Rósa Samuelsen
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen